## Cruiseskipini eru fullfermd av møguleikum – og avbjóðingum



NORA – Norrønt Atlantssamstarv – varpar ljós á vaksandi norðuratlantisku cruiseferðavinnuna við ráðstevnu í Keypmannahavn 14. februar. Ráðstevnan verður fyriskipað, tí alt fleiri og størri cruiseskip leggja at landi í mongu havnunum í Norðurhøvum. Í kjalarvørrinum á skipunum eru nýggir vinnumøguleikar, men eisini avbjóðingar. Á cruiseferðum upplivir ferðafólkið alt Norðuratlantshavi á somu ferð. Tí mugu londini í Norðuratlantshavinum styrkja samstarvið innan vaksandi cruiseferðavinnuna, sigur stjórin á NORA, Lars Thostrup. Ráðstevnan verður á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn hósdagin 14. februar. Skráin fyri ráðstevnuna sæst á heimasíðuni hjá NORA á HYPERLINK "http://www.nora.fo/" www.nora.fo og har ber eisini til at tekna seg. Avmarkað luttakarapláss.

# Flokkarnir líkjast m

**Tey somu gandaorðini ganga aftur í øllum valskráunum. Flokkarnir appellera breiðari enn nakrantíð. Javnaðarflokkurin er komin frá vinstru og Fólkaflokkurin frá høgru, og trunkaspælið á miðjuni í føroyskum politikki er sjónligari enn nakrantíð. Tí er spell, at teir spurningar, sum framvegis skilja flokkarnar, hava verið alt ov ósjónligir í valstríðnum higartil**




ANALYSA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Undirritaði fekk ein trupulleika í seinastu viku, tá valskráirnar skuldu gjøgnumgangast og analyserast. Tí hóast yvirskipaða hugsjónarliga útgangsstøði framvegis er at hóma, og hóast vit framvegis hava ítøkiligar ósemjur um loysing og samband, um ES, um fiskidagar og fiskiloyvi, um skatt, Kyoto-limaskap, fosturtøku og skrásett parlag, so ganga somu gandaorðini aftur í øllum valskráunum.

Umhvørvi er vorðið eitt nýtt mantra, sum allir flokkar leggja dent á. Útbúgving og gransking eru vorðin nýggj pluss-orð, sum verða endurtikin upp í saman (hóast vit dagliga hoyra um triðja heims-tilstandir í fleiri føroyskum skúlum og um túsundavís av útbúnum føroyingum, sum ikki koma heim aftur, tí her snøgt sagt ikki er nakað granskingarumhvørvi at koma heim til). Mentanin skal raðfestast sum ongantíð áður, hóast øll tey, sum vara av føroyskari mentan, rópa neyðarróp. Vælferðin og tey sonevndu "bleytu virðini", sjúkrahúsini, eldrarøktin og korini hjá menningartarnaðum og støkum uppihaldarum skulu ovast á breddan. Og so framvegis og so framvegis.

Valskráirnar til ársins løgtingsval eru nevniliga so drúgvar og umfatandi, at tær samstundis eru at kalla reinsaðar fyri ítøkiligum fíggjarligum raðfestingum. Og ein tekstur, sum vil broyta øll øki til tað betra, men sum ongar ítøkiligar fíggjarligar raðfestingar hevur, sigur ikki serliga nógv. Úrslitið er, at tað gerst trupult at orientera seg í politiska landslagnum.

Tí hvat skal byggjast fyrst, ein skúladepil, eitt universitet ella fimm røktarheim? Um játtanin til Mentunargrunn Landsins og Tjóðpall Føroya skulu tvífaldast, hvat skal so niðurprioriterast? Um sjúkrahúsið, eldrarøktin, játtanin til stakar uppihaldarar og fólkaskúlin skulu hava so og so nógvar pengar afturat, hvørjar kontur skulu so skerjast? Her vísa flokkarnir dirvisloysi og svíkja so dyggiliga.

### "Catch-all" flokkurin

Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, metir, at trunkaspælið á miðjuni í føroyskum politikki er sjónligari enn nakrantíð.

- Tað er í stóran mun trupult at skyna á, hvør flokkur hevur orðið. Fólkaflokkurin er vorðin sosialliberalur og tosar um tey veiku í øðrum hvørjum setningi. Javnaðarløgmaður hevur avtikið stættastríðið, og flokkur hansara góðtekur nú marknaðarliberalismu, privatiseringar og skattalættar. Og Sambandsflokkurin, Tjóðveldi, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin liggja inni á miðjuni við smærri variantum. Úrslitið er eitt trunkaspæl á miðjuni, sum gerst trengri og trengri, sigur Jógvan Mørkøre.

Við øðrum orðum er ikki so nógv eftir av teimum gomlu hugsjónarligu positiónunum, tá Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin vóru borgarligir, og tá Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin vóru garantar fyri solidariteti og kollektivari stýring. Gongdin er sambært Jógvani Mørkøre úrslit av einum ráki, sum hevur verið sjónligt í londunum kring okkum í mong ár, og sum nú tykist at sláa ígjøgnum í Føroyum.

- Gongdin er fyrst og fremst eitt úrslit av búskap-

*- Tað er í stóran mun trupult at skyna á, hvør flokkur hevur orðið. Fólkaflokkurin er vorðin sosialliberalur og tosar um tey veiku í øðrum hvørjum setningi. Javnaðarløgmaður hevur avtikið stættarstríðið, og flokkur hansara góðtekur nú marknaðarliberalismu, privatiseringar og skattalættar. Og hinir flokkarnir liggja á miðjuni við smærri variantum. Úrslitið er eitt trunkaspæl á miðjuni, sum gerst trengri og trengri*

*Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur*

*- Ein valskrá, sum einans sigur, at alt skal broytast til tað betra, sigur akkurát einki. Tá flokkarnir ikki so mikið sum ómaka sær at rokna uppá tey mongu og gyltu vallyftini, sum í hesum døgum bombardera føroyska veljaran, er talan um ábyrgdarleysa populismu*

*Jóannes Jacobsen, búskaparfrøðingur*